# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Fyrst og fremst haldi eg, at førleikarnir úti í feløgunum eiga at styrkjast*
*Høgni í Stórustovu*



*Tørvur er á einum grundleggjandi kjaki um føroyskan fótbólt, heldur Høgni í Stórustovu. Hann heldur tað tí vera spell, at hansara uppstilling ikki varð kunngjørd fyrr enn nú. Men hann vil eisini út at taka pulsin á einstøku feløgunum, um hann verður valdur til formann*

# Feløgini mugu styrkjast

**Høgni í Stórustovu sigur, at honum hevði dámt betur, um útmeldingin um hansara uppstilling var úti í góðari tíð. Hetta tí hann heldur, at føroyskur fótbóltur meira enn nakað hevur brúk fyri einum grundleggjandi kjaki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nýggi kandidaturin til ovasta FSF-sessin hevur í eina tíð umhugsað, um hann skuldi stillað upp til valið.

- Tá fleiri feløg heittu á meg um at stilla upp, so var hetta sjálvandi nakað, sum eg umhugsaði. Sjálvur vildi eg fegin, at hendan útmeldingin var komin alt fyri eitt. Tí tað hevði kunnað skapt eitt kjak um føroyskan fótbólt. Og um hvat tað var, sum partarnir hava at føra fram.

- Feløgini handan uppstillingina vildu tó hava meg at bíða við almannakunngerðini, til vit vóru beint undan evstamarki. Og í gjár boðaði eg so starvsnevndarfeløgum mínum frá avgerðini. Og segði samstundis við tey feløgini, sum skutu meg upp, at eg taki av møguleikanum.

### Mugu hjálpa feløgunum

Um orsøkina til, at Høgni í Stórustovu heldur seg framat heita stólinum, sigur hann, at hann sum so ikki hevur so nógv størri ætlanir, enn hann so leingi hevur havt.

- Eg havi sagt tað áður. Føroyskur fótbóltur hevur seinnu árini staðið á einum stórum vegamóti. Flestu feløgini eru serstakliga hart spent bæði fíggjar- og umsitingarliga, og vit síggja, hvussu títt útskiftingin av nevndarlimunum er.

- Og har er FSF nærmasti parturin at varpa ljós á trupulleikarnar og hjálpa feløgunum. Vit eiga at steðga á fyri líka sum at vita, hvønn veg føroyskur fótbóltur skal fara. Sjálvandi skulu vit hava ambitiónir, men hesar mugu eisini hava hald í veruleikanum. Tí mugu vit at kalla taka pulsin hjá einstøku feløgunum, og síðani royna at leggja okkara egna støði eftir hesum.

### Ikki bara pengar

Fyri tveimum árum síðani var ein øktur fíggjarligur stuðul til feløgini millum málini, sum Birgir Enghamar nevndi í sínum valdysti. Men fíggjarligur stuðul í sjálvum sær er ikki tað, sum Høgni í Stórustovu sær sum loysnina upp á trupulleikan hjá feløgunum.

- Fyrst og fremst haldi eg, at førleikarnir úti í feløgunum eiga at styrkjast. Við at traðka inn í altjóða fótbóltsheimin hava feløgini samstundis fingið hópin av krøvum, sum tey skulu lúka. Og tí er heilt víst tørvur á at styrkja umsitingarliga partin so ella so. Vit hava havt nøkur keðilig mál, og tað er væl hugsandi, at hesi als ikki høvdu verið, um feløgini vóru betur fyri á leiðslusíðuni.

- Og so ræður sjálvandi um, at feløgini ikki spenna seg meira, enn gott er. Stutt sagt, so er føroyskur fótbóltur noyddur til at røkta seg sjálvan. Fíggjarliga og umsitingarliga mugu vit fáa skil á, um ikki stórur partur av framda arbeiðinum skal detta niðurfyri, sigur Høgni í Stórustovu.



*Tvær ferðir hevur valdystur verið í nýggja FSF-húsinum við Tórsvøll. Annan leygardag verður aftur ein av slagnum. Hesa ferð millum Óla Holm og Høgna í Stórustovu*

# Høgni vil k

**Tey seks feløgini kring høvuðsstaðin skutu í gjárkvøldið Høgna í Stórustovu upp sum nýggjan FSF-forseta. Soleiðis verður talan aftur um kampval, tá FSF hevur aðalfund**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður sagt um nú fráfarandi cubanska forsetan, Fidel Castro, at hann hevur yvirlivað hundraðtals sníðálop. Óli Holm hevur kanska ikki heilt upplivað slíkan ágang, men triðja aðalfundin á rað má føroyski fótbóltsovastin brynja seg út til kampval. Hetta tí tey seks høvuðsstaðarfeløgini - AB, B36, HB, Fram, NÍF og Undri – hava skotið Høgna í Stórustovu upp til sessin.

### Triðja royndin

Tað var annars ikki gamalt við fleiri kandidatum til sessin. Torleif Sigurðsson, sáli, sum sat á formanspostinum í 21 ár, hevði ongan tíð nakað mótvalevni móti sær, og tá Dánjal Andreasen tók við eftir Torleif, hendi hetta eisini uttan atkvøðugreiðslu.

Men síðani hevur talan altso verið um kampval. Í 2004 var næstan ikki til at fáa greiðu á, hvør stillaði